## Sir Edmund jarðaður



Sir Edmund Hillary, ið saman við Tenzing Norgay var fyrsti maður á toppinum á Mount Everest, fór til gravar í Auckland í Ný Sælandi í gjár. Við sær í grøvina hevði hann ísøksina, sum hann hevði við sær á ferðini niðan á heimsins hægsta fjall. Fleiri hundrað fólk vóru og fylgdu Sir Edmund til gravar, og nýsælendski forsætisráðharrin helt líktaluna. Bretska kongshúsið hevur gjørt av at hava minningarhald í London seinni.

## Úr fiski í køkin

Varastjórin í Royal Greenland, Henrik Karup Jørgensen, hevur sagt upp, tí hann hevur fingið starv sum aðalstjóri í donsku køksverksmiðjuni HTH-køkkener. Henrik Karup Jørgensen hevur arbeitt hjá Royal Greenland síðani í 2001, og tey seinastu trý árini hevur hann havt ábyrgdina av framleiðslu, flutningi og góðsku uttan fyri Grønland. Sjálvur sigur hann, at Royal Greenland er ein fyritøka við stórum møguleikum í komandi árum.

## Sannlíkindi:

Petur Zachariassen, hagfrøðingur, sigur soleiðis um sannlíkindini fyri tippingina hjá Sosialinum, har fólk skulu gita, hvørji 33 enda við at verða vald:

- Siga vit, at 25 tingsessir eru givnir frammanundan, so ræður um at gita hvørji tey 8, ið resta í, eru.

Undir tí fortreyt, at man velur púra frítt millum tey 146 (171-25) valevnini, eru sannlíkindini fyri av 8 krossaðum at raka rætt við 5 valevnum 0.0000057, ella 6 ferðir úr eini millión royndum.
Og tá er man uppi á 30 røttum tingfólkum!

Broyta vit fortreytina til, at 100 av teimum 146 ikki koma upp á tal, broytast sannlíkindini fyri av 8 krossaðum at raka rætt við 5 valevnum (burturúr 46) 0.0018 ella uml. 2 ferðir úr túsund royndum.

Sannlíkindini fyri tá av 8 krossaðum at raka rætt við 6 valevnum (burturúr 46) er 0.00075!

**Flóvin tippaði:**

| | |
|---|---|
| Anfinn Kallsberg | Katrin Dahl Jakobsen |
| Annika Olsen | Kári á Rógvi |
| Heðin Zachariasen (Jákup Mikkelsen) | Kári P. Højgaard |
| Jacob Vestergaard | Annita á Fríðriksmørk |
| Jógvan á Lakjuni | Bergtóra Høgnadóttir Joensen |
| Jørgen Niclasen | Bjørt Samuelsen |
| Poul Michelsen | Heini Oyolvur Heinesen |
| Alfred Olsen | Hergeir Nielsen |
| Bjørn Kalsø | Høgni Hoydal |
| Edmund Joensen | Páll á Reynatúgvu (Sjúrður Skaale) |
| Johan Dahl | Tórbjørn Jacobsen |
| Kaj Leo Johannesen | Bill Justinussen |
| Magni Laksáfoss | Karsten Hansen |
| Marjus Dam ( - ) | - (Jenis av Rana) |
| Rósa Samuelsen | |
| Gerhard Lognberg | (Tey í parantes gjørdist endaliga úrslitið) |
| Hans Pauli Strøm | |
| Helena D. á Neystabø | |
| Jóannes Eidesgaard | |
| John Johannessen | |

# Minst av teimum stóru

**Nú Javnaðarflokkurin fyllir 80 ár, er flokkurin fyri fyrstu ferð minstur av teimum stóru flokkunum. Og verður løgmaður sitandi, hevur háborgin hjá flokkinum – Suðuroyggin – ongan javnaðartingmann**

POLITIKKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við seks tinglimum mótvegis sjey og átta hjá Fólkaflokkinum, Sambandinum og Tjóðveldinum er Javnaðarflokkurin nú minstur av teimum stóru flokkunum. Og tað er ein støða, sum tey á lista C ikki eru von við.

- Valið gav til kennar nøkur viðurskifti, sum helst ikki vóru til okkara fyrimun. Og sjálvandi eru hesi viðurskifti at finna ymsastaðni. Men eg haldi kortini, at vit eru í eini góðari støðu. Tí vit sita í samráðingum við nakrar partar, sum vilja samstarva við okkum. Og tað gevur okkum møguleika at fáa ávirkan, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður og formaður hjá føðingardagsbarninum.

- Og Javnaðarflokkurin stendur framvegis á sama grundvølli, sum vit gjørdu fyri 80 árum síðani. Einum grundvølli, sum vit framhaldandi halda okkum kunna fremja stór framstig á, segði løgmaður við Rás2,

### Skyldu til landspolitikl

Suðuroyggin hevur í mangar mátar verið mett sum háborgin hjá Javnaðarflokkinum. Aloftast hevur flokkurin havt tveir tinglimir – og onkra tíð tríggjar – úr oynni, men hetta er nú søga. Broytta valskipanin við einum valdømi ber við sær, at verður løgmaður sitandi, kann flokkurin standa í teirru støðu, at tey ikki hava tinglim úr Suðuroynni. Mikkjal Sørensen er níggjundi maðurin á javnaðarlistanum, so fær flokkurin tvey landsstýrisumboð úr verandi tingmanning, er hann fyrsti varamaður.

- Hetta er ein avleiðing av, at Føroyar nú eru eitt valdømi. Men júst tann broytingin ber við sær eina skyldu til tinglimirnar. Tá tú stillar upp fyri alt landið, so hevur tú eisini eina skyldu at røkja uppgávurnar fyri alt landið, og tað vóni eg, at allir tinglimir eisini gera, segði Jóannes Eidesgaard.


i Sosialurin

Catering manning til Smyril

Við hesum verður søkt eftir 8 ¾ tíð størvum til cateringina á Smyril.

Viðkomandi skal byrja umborð á Smyrli, men kann til eina og hvørja tíð verða fluttur, sum fyriskipað av leiðsluni. Arbeiðs- og vaktarskipanin verður fyriskipað í mun til galdandi ferðaætlan hjá tí skipi, ið ein verður settur umborð á.
Tann, ið settur verður, má kunna byrja beinanvegin vakt hansara er útarbeidd.

Starvið fevnir um
Starvið fevnir um alt frá vanligum kafetertia og kioskarbeiði til uppreiðing, reingerðing o.a.

Førleikakrøv
- Prógv í nýslu av bjargingarútgerð
- Galdandi heilsuváttan
- Hollur málkunnleika til føroykst,danskt og enskt

Annars vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevnir, dugir at arbeiða sjálvsstøðugt og er fyrikomandi, smílandi og røkin.

Setanartreytir
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjamálaráðið og Starvsmannafelagið.

Umsóknir
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til :

Strandfaraskip Landsins
Sjógøta 5
Post boks 30
Fo-810 Tvøroyri

Og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 30.januar 2008.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jan Haldansen, deildarleiðara, tlf 543041 ella e-post: jah@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 6 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í tríggjar deildir: Samferðslu-, Sjó-, og Fíggjardeild.

temp-team
VAL AV STARVSFÓLKI & VIKARUM



Kom og skráset teg

Kundi tú hugsað tær at arbeitt sum vikarur? Ella komið í eitt fast starv?

Vilt tú verða fleksibul og ráða yvir tíðini sjálv/ur?

Vit hava eisini brúk fyri pensionistum og lesandi.

Vit røkka um alt landið.

TEMP-TEAM er eitt vikarbureau.

TEMP-TEAM Føroyar er ein partur av fleiri deildum runt um í Europa og úti í heimi.

Okkara uppgáva er at finna starvsfólk, ið kunnu arbeiða sum vikarar og tey sum vilja koma í eitt fast starv, bæði á sjógvi og landi.

Far inn á heimasíðu okkara **www.temp-team.fo**
TEMP-TEAM, Niels Finsensgøta 37, FO-100 Tórshavn **Tel.: +298 61 61 00**

Lesið Sosialin - so eru tit við